# Oljupengar til golf-útbúgving skal gagna ferðavinnu



*Ben Arabo, stjóri í Amerada Hess: - Umsóknin til golfútbúgving lýkur treytirnar fyri at lata stuðul til førleikamenning, nú ætlanin við hesum tiltaki er at menna møguleikarnar hjá ferðavinnuni*

FØRLEIKAMENNING

*Jan Müller*

Nú tosað verður um at fáa fleiri ferðafólk til Føroya eru mong hugskot og ætlanir frammi. Ein av teimum nýggjastu er at byggja golfvøll/fasilitetir í høvuðsstaðnum og menna møguleikarnar hjá eitt nú útlendingum, sum koma henda vegin, fyri at gera golf til ein part av ferðini í Føroyum. Við hesum í huga varð herfyri søkt um játtan frá oljufeløgunum um at útbúgva ein føroying til at taka sær av at umsita ein golfvøll og tí hartil hoyrir. Og herfyri vórðu pengar játtaðir av kontoini til førleikamenning til golfútbúgving í Skotlandi. Talan er um eina trý ára útbúgving á "University of Highlands and Islands" í Cape Ness í Norðurskotlandi. Talan er um eitt skeið í Golf Facility Management. Tvs. at kunna stjórna einum golfvølli/fasilitetum, og í hesum førinum er talan um ein komandi golfvøll , sum er í umbúnað.

Í grundgevingunum fyri at lata stuðul (sum Sosialurin hevur fingið innlit í) stendur m.a. at golfítrottur-in veksur við rúkandi ferð í okkara grannalondum. Í Íslandi eru 60 golfbreytir og í Hetlandi tríggjar. Golf er ikki bert ein ítróttur, tað er vorðin ein heimsumfatandi vinna. Tórshavnar Golfklubbi hevur í nøkur ár havt eitt ávíst virksemi og nú er ætlanin at betra um umstøðurnar. Ásannað verður, at ein nýggj og størri golfbreyt vil ivaleyst hava stóran týdning í tí framhaldandi menningini av føroysku ferðavinnuni. Men um ein breyt skal rekast á skilabesta hátt er týdnignarmikið, at fólkini íð standa fyri hava hollan kunnleika innan golf. Tað er tí sambandi at ein føroyingur umhugsar at læra innan "Golf Management".

Stuðlað verkætlanini hava Amerada Hess og BP. Eisini Oljufyrisitingin hevur tikið undir við ætlanini m.a. grundað á: at talan er um ætlan, ið kann stuðla undir golf sum komandi vinnuveg.

Vit spurdu Ben Arabo, stjóra í Amerada Hess, hvat orsøkin er til, at ein so óvanlig verkætlan sum henda verður stuðlað. Hann sigur, at talan er ein útbúgving, sum hevur vinnuligar møguleikar í sær. -Er hetta ein førleiki, sum kann geva kommerciellar møguleikar í Føroyum og fyri ferðavinnu, so kvalifiserar tað til førleikamenning. Vit síggja hetta fyrst og fremst sum eitt ferðavinnuprojekt sigur Ben Arabo. Talan er ikki um at geva einum persóni stuðul til at spæla ítrótt men at standa fyri eini verkætlan, sum skal kunna koma ferðavinnunu í Føroyum til góða. Ben Arabo sigur, at hetta snýr seg um at menna ein førleika í tí sum er "Golf Facility Management". Er tað ein førleiki, sum kann geva ferðavinnuni inntøkumøguleikar, so lýkur tað avgjørt treytirnar fyri at játta pengar. –Vit fara annars ikki at seta okkum sum dómarar fyri, hvat slag av vinnu skal hava stuðul.


Starvsfólk
til Sunset Boulevard í SMS




petur & petur • 320870

**Aftaná skúlatíð**
Søkt verður eftir fólki M/K at arbeiða nakrar tímar um vikuna - eftir skúlatíð og í vikuskiftunum - at byrja skjótast tilber. Eitt sera vælegna starv hjá teimum lesandi.
Ert tú opin, virkin og røkin, so ert tú kanska ein av teimum, vit leita eftir. Vit vænta, at tú eins og vit eru tilreiðar at veita kundum okkara eina skjóta og góða tænastu.
Vit læra teg á staðnum...

**Hálva tíð**
Søkt verður fólki M/K at arbeiða hálva tíð - um dagin, kvøldið og í vikuskiftunum - at byrja skjótast tilber.
Ert tú opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða við fólkum, so er hetta júst nakað fyri teg. Tú gerst partur av einum vælleikandi liði við nógvum starvsfólkum í einum nógv vitjaðum umhvørvi.
Vit læra teg á staðnum...

**Fulla tíð**
Søkt verður fólki M/K til fulltíðarstarv - at byrja skjótast tilber. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir og eftir hetta gerst tú eitt av álitisstarvsfólkum okkara. Vit gleða okkum at hoyra frá tær...

**Send umsóknina til:** Sunset Boulevard, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn.
Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. apríl 2004.

Sunset Boulevard • SMS • Postboks 1059 • FO-110 Tórshavn